## Elizabeth hartar bløðini

Í Bretlandi er Elisabeth drotning troytt av, at tey bretsku bløðini prenta sokallaðarar paparazzi-myndir av teimum kongaligu, og nú hevur hon biðið bløðini gevast við tí. Í brævi til fleiri blaðstjórar heita advokatarnir hjá kongshúsinum á blaðstjórarnar um at vísa virðing fyri privatlívinum hjá teimum kongaligu. Á jólum fæst at síggja, um bløðini fara at gera eftir áheitanini. Tá fara tey kongaligu at halda jól á Sandringham-slottinum, og so er spurningurin um nakrar langar fotolinsur vera uttanfyri, skrivar Sunday Telegraph.



## Brown dragnar aftur

Tvær meiningakanningar, sum vórðu kunngjørdar í Bretlandi um vikuskiftið, benda á, at hetta stjórnarskeiðið hjá Arbeiðaraflokkinum fær ein enda næsta ár. Í síðsta mánað vístu kanningar, at Arbeiðaraflokkurin var farin at toga seg inn á konservativa flokkin, men tær nýggju kanningarnar vísa, at stjórnarflokkurin er aftur farin at dragna. Reuters skrivar, at eftir teimum nýggju kanningunum fer konservativi flokkurin hjá David Cameron at fáa millum 20 og 50 tinglimir fleiri enn Arbeiðaraflokkurin á valinum, sum verður næsta ár.

# Flótibrúgv til Bursatanga

**Á býráðsfundinum seinasta hóskvøld samtykti Tórshavnar býráð at keypa eina flótibrúgv at brúka við Bursatanga um sumnarnar**

BÝRÁÐSFUNDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Orsøkin til, at Tórshavnar havn ynskir eina nýggja flótibúgv er, at ofta eru fleiri stór ferðamannaskip á redini í senn, og tá tað bert sum er ber til at leggja at við trækeina á Bursatanga, er ynski sett fram um at fáa eina flótibrúgv at bøta um trupulleikan.

»Tað kemur meiri enn so fyri, at fleiri enn eitt skip liggja á redini samstundis, og kann tað tí gerast heldur trongligt við træbryggjuna. Eisini kemur tað fyri, at skip eru á Havnini á Ólavsøku, tá tað ikki er møguligt at koma inn um molan millum klokkan 14 og 18«, verður sagt í grundgevingini.

Av tí at tað verður møguligt at hava fleiri skip á redini enn eitt og at hava skip á ólavsøku um flótibrúgv verður keypt, verður mælt til hetta. Víst verður á, at tað ber til at leggja eina flótibrúgv á uttaru síðu av Bursatanga, og á ólavsøku kann hon leggjast til Skansabryggjuna.

»Umframt at brúka brúnna til ferðafólkaskip, kann hon eisini brúkast til onnur hóskandi endamál. Møguligt er at keypa eina 24x5 metur stóra flótibrúgv fyri 400.000 krónur«, verður sagt í grundgevingini.

Havnameistarin mælti til at játta peningin av íløgum hjá Tórshavnar havn til endamálið, og havnanevndin samtykti at taka undir við tilmælinum. Tað gjørdi fíggjarnevndin eisini, og hetta varð so endaliga samtykt á býráðsfundinum hóskvøldið.



*Her á uttaru síðu av Bursatanga fer at flótibrúgv at liggja komandi summar*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Boðanesheimið bjóðast út

**Á býráðsfundinum herfyri varð samtykt, at Boðanesheimið skal bjóðast út í innbodnari licitatión. Málið skal avgreiðast skjótt, so arbeiðið kann byrja so skjótt sum gjørligt**

BÝRÁÐSFRUNDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Sonevnda Boðanesheimið hevur seinastu mánaðirnar – og kanska árini – fingið nógva umrøðu. Tørvurin á røktarheimsplássum er rættiliga stórur í Tórshavnar kommunu, og ynski hevur leingi verið um at bøta um støðuna.

Glið kom veruliga á málið, tá landið boðaði frá, at kommunurnar fáa stuðul at byggja røktarheim. Stuðulin er helmingurin av kostnaðinum tó bert upp til 700.000 krónur pr. búpláss.

Halla Samuelsen, forkvinna í sosialu nevnd hjá Tórshavnar býráð, sigur, at lýsing fer í bløðini hesa vikuna til eina prekvalifikatión, har byggifeløg kunnu bjóða seg fram.

- Prekvalifikatiónin hevur freist til 15. januar, og tá er so ætlanin at velja upp til fimm fyritøkur út til eina innbodna lisitatión, sigur Halla Samuelsen.

Røktarheimið, sum á mannamunni verður kallað Boðanesheimið, fer at hava pláss fyri 64 búfólkum.

Mett verður, at tørvurin í kommununi er 145 pláss, harav eini 75 eru bráfeingis tørvur. Nýggja røktarheimið dekkar tí fram ímóti bráfangis tørvinum.

Heimið verður bygt soleiðis, at nøkur av rúmunum verða til fólk við serligum tørvi, eitt nú sálarliga sjúk ella fólk, ið á einhvønn hátt ikki kunnnu verða saman við øðrum.

- Tað kunnu verða til fýra búfólk ella niður í tvey soleiðis, sum tørvurin einaferð er, sigur Halla Samuelsen.

### Liðugt í 2012

Tá tær upp til fimm byggifyritøkurnar eru útvaldar, fáa tær tíð fram til apríl/mai at lata síni tilboð inn, og so er ætlanin, at arbeiðið kann byrja eftir summarfrítíðina.

Umsitingin gjøgnumgongur í løtuni byggiskránna, og tá tað er gjørt, verður lýst í bløðunum. Talan verður um føroyskar byggifyritøkur, tí lýst verður ikki í donskum bløðum.

Stuðulin frá landinum verður upp til 44,8 milliónir krónur og roknað verður við, at samlaði prísurin tí fer at liggja um tær 90 milliónirnar.

Býráðið ætlar at fíggja sín part av kostnaðinum við lánstøku.

Tær fimm byggifyritøkurnar, sum verða valdar út, fáa upp til 150.000 krónur í samsýning, tó ikki tann, ið fær arbeiðið at gera. Tilboðini verða vektað eftir arkitekturi 20%, funktionaliteti 20%, tilfar/góðska 15%, tilboðsupphædd 20% pg samsvar við byggiskránna 25%.

Halla Samuelsen sigur, at ætlanin er at byrja bygginga eftir summarfrítíðina og at heimið skal standa liðugt fyrst í 2012.

- Tað fer so at ganga ein mmánaður ella so frá tí at arbeiðið er liðugt, til fystu búfólkini kunnu flyta inn, sigur Halla Samuelsen, forkvinna í sosialu nevnd.



*Miðað verður ímóti at byrja arbeiðið upp á nýggja røktarheimið yviri við Strond eftir summarfrítíðina*